**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 0808.**
**Tíðarskeið: 10/03-31/03 - 2008**

**Fólk við frá Fiskirannsóknarstovuni:** Petur Steingrund (10-17/3 og 29-31/3), Jákup Reinert (19-27/3), Lis Larsen (10-27/3), Rógvi Mouritsen (10-27/3), Hallur Joensen (10/3 og 23-31/3), Kristian Zachariassen (10/3-23/3), Mourits Mohr Joensen (29-31/3), Regin Kristiansen (29-31/3) og Petra Hansen (10-17/3 og 29-31/3). Tíðarskeiðið 29-31/3 var tikið burtur av túri 0812 (yvirlitstroling á Føroyabanka).

**Ábyrgd:** Petur Steingrund og Jákup Reinert, ið eisini vóru toktleiðarar.

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldu vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd, og tilfar til aldursgreining av havtasku og smáttfallandi svartkjafti skal fáast til vega. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa.

**Eyka uppgáva:** Prøvar av gulllaksi vórðu tiknir til Lise Ofstad. Petra Hansen tók prøvar av toski til genetiskar kanningar. Støðir við Thermistor-ketu vórðu tiknar. Hitin í trolinum varð skrásettur við miniloggarum.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinhamns lemmar. Breitlar 60 og 120 m.

**Kanningarøki:** Trolstøðirnar eru lagdar kring allan Landgrunnin grynri enn 500 m, sí mynd 1.






**Mynd 1**. Yvirlitstrolingar á vári við Magnusi Heinasyni. Landgrunnurin er býttur upp í 15 øki eftir dýpi og ætt. Ávíst tal á støðum verður tikið í hvørjum øki, tilsamans 100 støðir fyri allan Landgrunnin. Somu støðir verða tiknar á hvørjum ári.

**Um túrin:** Yvirlitstrolingarnar vórðu nakað seinkaðar í ár, tí Magnus Heinason mátti umvælast aftan á eldin, sum var umborð í oktober í fjør. Í staðin fyri at hava tveir túrar, vórðu allar støðirna tiknar á einum túri (0808), men vit máttu umframt brúka tríggjar dagar av túri 0812 (yvirlitstroling á Føroyabanka); ein støð sunnast á Munkagrunninum mátti tíverri liggja eftir fyri at fáa tíð til Føroyabanka eisini. Farið varð av Havnini leygardagin 10/3 og so vórðu støðirnar tiknar í somu raðfylgju sum undanfarin ár, tvs at støðirnar eystanfyri vórðu tiknar fyrst, síðan á Norðhavið, vestur í Vágahavið og til seinast á Munkagrunnin. Puntur X25 kundi ikki takast fyri línu, og X21 varð tikin í staðin. Støðin suður úr Trælanípuni kundi ikki takast, tí tað bleiv fast, og ein eykastøð eystan fyri Húsavík varð tí tikin í staðin.
Vit vóru fleiri ferðir í landi, tí brek vóru við fabrikkini/mátibrettum og fyri at skifta fólk og landa. Veðrið var vánaligt til tíðir. Tað var sum heild lítið at fáa. 99 støðir vórðu tiknar tilsamans.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var eftir ætlan fyri tosk og hýsu, men nakað lítið fyri upsa, tí vit fingu ov lítið.

**Talva 1.** Yvirlit yvir nytru- og magaprøvar á Magnus Heinason túri nr. 0808.

| Toskur | Toskur | Hýsa | Hýsa | Upsi | Upsi | Havtaska |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski |
| 1007 | 189 | 1003 | 241 | 989 | 187 | 10 |

| | |
|---|---|
| Tal á nytraðum fiski tilsamans: | 3009 |
| Tal á magum tilsamans: | 617 |

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 2. apríl. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu sum skjótast, helst áðrenn 11. apríl.

**Fyribilsúrslit:** Vit fingu eitt vet meira av toski í ár (106 kg/hál) enn í 2006-2007 (umleið 60 kg/hál). Meira av nebbasild var í fiskamagum á fleiri støðum. Toskurin var væl fyri, eins og í fjør. Vit fingu ongan merktan fisk. Vit fingu ein silvurkalva.

**Fyribils úrslit:** Ikki fyrr enn nytrurnar eru lisnar, og øll data frá túrinum eru løgd í basu, ber til at siga nakað nágreiniligt um úrslitini av yvirlitstrolingunum á vári í ár, men nøkur ávegis úrslit skulu takast fram. Talva 2 vísir yvirlit yvir veiðuna av teimum ymsu fiskasløgunum á túrinum; 43 fiskasløg vórðu veidd íalt umframt hummara, mathøgguslokk, agnhøgguslokk og ymiskt annað, ið er bólkað sum skrambul, t.d. grót, krossfiskar og igulker. Hetta tal á sløgum er rættiliga vanligt fyri yvirlitstrolingarnar á vári. Mest varð fingið av upsa, og síðan koma ávikavist toskur, hýsa, hvítingsbróðir, lítli kongafiskur og gulllaksur. Í talvu 2 sæst eisini, á hvussu nógvum støðum, tey einstøku fiskasløgini eru fingin, t.e. hvussu vanlig tey eru. Hýsa varð fingin á 89% av støðunum, upsi á 86% og toskur og lítli kongafiskur á 73%.

Størsti denturin á hesum túrum verður lagdur á tosk, hýsu og upsa; men eisini fyri onnur sløg fast ein ábending um, hvussu nógv er til. T.d. tykist serliga hvítingsbróðir, men eisini lítli kongafiskur og gulllaksur at vera væl fyri, meðan veiðan av svartkjafti var lítil samanborin við seinastu árini, hóast eitt vet størri enn í fjør. Nevnast skal eisini, at mathøgguslokkur, ið annars bert plagdi at vera á Føroyabanka, nú hesi seinastu árini er vorðin alt vanligari á landgrunninum. Hetta samsvarar væl við fráboðanir seinastu tvey

árini frá trolarum og garnabáti, ið royna á landgrunninum, um, at nógv hylki við rognum frá mathøgguslokki hanga í reiðskapinum. Magakanningar seinasta summar vístu eisini, at á summum leiðum hevði serliga upsin fitt av mathøgguslokki í maganum.

Á myndunum 2-4 sæst veiða upp á roynd frá yvirlitstrolingunum á vári fyri ávikavist hýsu, tosk og upsa. Veiða upp á roynd verður vanliga nýtt sum eitt mát fyri, hvussu stórir stovnarnir eru í vekt  Tølini fyri upsa skulu tó takast við stórum fyrivarni, tí slíkar yvirlitstrolingar vísa seg at vera rættuliga óneyvar fyri upsa; hetta skyldast m.a., at upsi ofta gongur í torvum, og at eldri upsi ofta fer upp í sjógvin.

Við tí stóra veiðutrýsti, ið er undir Føroyum, vil tilgongdin av ungfiski tey einstøku árini í stóran mun gera av, hvussu stórur stovnurin er. Av tí sama er stórur partur av stovninum ungur fiskur. Og bæði stovnur og veiða vilja vera skiftandi ár undan ári, tí tilgongdin  er skiftandi. Vøksturin á fiskinum hevur sjálvandi eisini týdning fyri, hvussu stór stovnsvektin er. Í ár vóru toskurin og hýsan hampuliga væl fyri, meðan upsin yvirhøvur var rakari.




**Mynd 2**. Veiða upp á roynd fyri tosk frá yvirlitstrolingunum á vári.

Á mynd 2 sæst, hvussu skjótt toskastovnurin kom fyri seg aftur eftir tey sera vánaligu kreppuárini, og var orsøkin teir sera góðu árgangirnir frá 1992 og 1993. Eisini hýsustovnurin vaks skjótt (Mynd 3), og var tað her 1993- og 1994-árgangirnir, ið skaraðu framúr. Góð tilgongd hevur eisini fingið allar tríggjar stovnar at vaksa, men frá 2002 er toskastovnurin nógv minkaður til søguliga lág virði. Hóast úrslitið fyri tosk í 2008 er nærum dupult so stórt sum í 2006 og 2007, so er stovnurin enn á einum sera lágum støði søguliga sæð, og hann hevur alla vernd fyri neyðini. Ikki fyrr enn nytrurnar eru lisnar um einar tvær vikur, kann aldursbýtið í stovninum verða roknað, so at m.a. støddin á nýggjum árgangum kann verða mett. Men umráðandi er, at smáfiskurin fær frið at vaksa, so at toskastovninum kann koma fyri seg aftur.

Fyri hýsu er farstrikan eisini minkað støðugt síðan 2002, og var úrslitið í 2008 bert eina helvt av tí í 2007 (Mynd 3); størsta orsøkin til hesa minking stavar helst frá vánaligari

tilgongd í nógv ár. Havandi í huga ta stóru óvissu við slíkum kanningum av upsa, so er ein varislig niðurstøða helst, at upsastovnurin enn er lutfalsliga væl fyri (Mynd 4).




**Mynd 3**. Veiða upp á roynd fyri hýsu frá yvirlitstrolingunum á vári.




**Mynd 4**. Veiða upp á roynd fyri upsa frá yvirlitstrolingunum á vári.

Jákup Reinert og Petur Steingrund

**Talva 2.** **Yvirlit yvir veiðu pr. fiskaslag á túri 0808**
**99 støðir íalt**

| **Fiskaslag** | **Veiða, kg** | **Veiða pr. støð, kg** | **Støðir við fiski, %** |
|---|---|---|---|
| Upsi | 11027.738 | 111.391 | 86 |
| Toskur | 10511.815 | 106.180 | 73 |
| Hýsa | 8570.519 | 86.571 | 89 |
| Hvítingsbróðir | 7897.668 | 79.774 | 58 |
| Lítli kongafiskur | 4509.594 | 45.551 | 73 |
| Gulllaksur | 3864.371 | 39.034 | 27 |
| Longa | 1132.664 | 11.441 | 56 |
| Svartkjaftur | 1121.195 | 11.325 | 15 |
| Stóri kongafiskur | 1036.353 | 10.468 | 29 |
| Hvítingur | 759.151 | 7.668 | 24 |
| Reyðsprøka | 423.803 | 4.281 | 39 |
| Knurrhani | 356.364 | 3.600 | 31 |
| Silvurmurtur | 287.007 | 2.899 | 3 |
| Trantkongafiskur | 223.392 | 2.256 | 9 |
| Brosma | 203.707 | 2.058 | 31 |
| Tunga | 198.082 | 2.001 | 55 |
| Skrambul | 169.038 | 1.707 | 71 |
| Rognkelsi | 137.855 | 1.392 | 15 |
| Havmús | 133.149 | 1.345 | 5 |
| Kalvi | 113.129 | 1.143 | 29 |
| Mathøgguslokkur | 92.982 | 0.939 | 30 |
| Havtaska | 88.505 | 0.894 | 7 |
| Sandsprøka | 63.290 | 0.639 | 25 |
| Lálla | 48.803 | 0.493 | 5 |
| Blálonga | 42.826 | 0.433 | 9 |
| Hvassasprek | 28.537 | 0.288 | 19 |
| Kjaftsvarti kongafiskur | 22.348 | 0.226 | 2 |
| Glaskvoysa | 21.999 | 0.222 | 7 |
| Liri | 20.665 | 0.209 | 2 |
| Búksvarti hávur | 17.813 | 0.180 | 2 |
| Sild | 10.420 | 0.105 | 11 |
| Lítlabrosma | 9.294 | 0.094 | 2 |
| Lýrur | 7.485 | 0.076 | 1 |
| Agnhøgguslokkur | 6.489 | 0.066 | 5 |
| Silvurkalvi | 6.010 | 0.061 | 1 |
| Klingruskøta | 5.801 | 0.059 | 2 |
| Steinbítur | 5.050 | 0.051 | 2 |
| Skøta | 3.305 | 0.033 | 1 |
| Svartkalvi | 2.050 | 0.021 | 1 |
| Hummari | 1.345 | 0.014 | 3 |
| Nebbasild | 1.126 | 0.011 | 7 |
| Úlvfiskur | 0.754 | 0.008 | 1 |
| Rossamakrelur | 0.512 | 0.005 | 2 |
| Tindaskøta | 0.212 | 0.002 | 1 |
| Makrelur | 0.155 | 0.002 | 1 |
| Kámi úlvfiskur | 0.018 | 0.000 | 1 |